## Jóan Símun og Newcastle fingu Chelsea

Lutakastið til triðja umfar í Carling Cup hevur verið. Jóan Sìmun og Newcastle skulu longu leiðina til London at vitja Chelsea. Jóan Símun Edmundsson var í hópinum, tá Newcastle í 2. umfari spældi ímóti Accrington Stanley og vann 3-2. Jóan Símun kom ikki á dómaraseðilin, men tað er mangan í Carling Cup, har Premier League liðini velja at royna yngri leikarar. Tí var tað óheppi, at Chelsea kom úr pottinum, tí tað er heldur óhugsaði, at Chris Hughton fer at geva teimum ungu møguleikan í einum slíkum torførum útidysti. Tann mest spennandi dysturin í triðja umfari er uttan iva London grannauppgerðin millum Arsenal og Tottenham. Bæði Liverpool og Manchester United fingu lættar uppgávur á heimavølli. Liverpool møtir Northampton, meðan Manchester United skal á vitjan hjá Scunthorpe, sum í fjør hevði vitjan av Manchester City við Gunnari Nielsen á bonkinum.

## Bestu sms´ini í »3. Hálvleiki«

**Besta sms'ið vann eina landsliðstroyggju :**

- *B36 dugdi ikki at spæla 11 ímóti 10. Tann eini B36'arin stóð alla tíðina fyri, tá teir skutu uppá mál.*

**Trý sms vunnu hvør sítt atgongumerki til landsdystin millum Føroyar og Serbia:**

- *Hvíti tigarin er nú útdeyður, seinastu rovini liggja í Sarpugerði.*
- *Gott hugskot til næstu stakfløguna hjá Týr: »Símun The Red«*
- *»Vespan á Svangaskarði toldi ikki fulla hædd, hon bleiv bæði skadd og rædd. Svangaskarð var ei hennara mið, tapti og misti trý stig. Oman aftur í Heiðarnar fór við eitt hvin. Syngið nú: »We are all in the YELLOW SUBMARINE«*

# uttanfyri«



gjørdist skjótt greitt, at okkurt var galið. Tað er lærinum í vinstra beini tað er galið við, og tað endaði við, at eitt hefti í lærvøddanum skrædnaði. Tá kappingin var liðug, fór eg at kanna skaðan nærri, og tá mátti eg halda steðg í næstan 10 mánaðir, sigur Rógvi.



## Tann ringasta løtan, eg havi havt, meðan eg havi verið skaddur, var tá steypafinalan var

### Skaddur Rógvo til ÍF

Rógvi skifti í 2009 til ÍF, men tá var longu greitt, at hann møguliga ikki kom at spæla ein stóran leiklut í kappingarárinum hjá ÍF. Tað gekk rúm tíð, áðrenn Rógvi endiliga kom á vøllin fyri nýggja felagið.

– Tað var ikki fyrr enn í seinnu hálvu av 2009, at eg gjørdist klárur og fekk spælt. Tað var sjálvandi ikki við fullari megi, tí eg var ikki í form, men eg hevði sum so ongar trupulleikar av skaðanum, sigur Rógvi Jacobsen.

### Gongur galið í Gundadali

Rógvi ger seg nú kláran at fara í gongd við kappingarárið 2010. Alt gongur væl, men tíðliga í mai er ÍF á vitjan hjá B36 í Gundadali.

– Tað kendist, sum eg beklaði, men tað gjørdi eg ikki. Tá var tað ein spong í fótinum, sum var strongd so mikið, at fóturin hóvnaði. Hesin seinni skaðin er ein fylgja av tí fyrra skaðanum. Síðani havi eg ikki kunna runnið, og skaðin vil ikki lekja, sigur Rógvi Jacobsen.

### Steypafinalan ringasta løtan

Rógvi hevur nú sitið uttanfyri í góðar fýra mánaðir, men hvussu er tað hjá Rógva at standa uttanfyri, tá hinir renna á vøllinum?

– Tað er sjálvandi súrt at standa uttanfyri, tá hinir spæla dyst og venja. Eg havi ringt við at góðtaka, at eg ikki kann spæla, tí eg havi sjáldan verið skaddur, sigur Rógvi Jacobsen.

Felagið hjá Rógva, ÍF, var í summar í steypafinaluni, ið var leikt í heimbýinum hjá Rógva, Klaksvík.

– Tann ringasta løtan, eg havi havt, meðan eg havi verið skaddur, var tá steypafinalan var. Tað var ótrúliga ringt at standa uttanfyri tá. Eg haldi, eg hevði fleiri nervar, enn tá eg spæli við sjálvur, sigur Rógvi Jacobsen.

### Vil bara blíva frískur

Men er málið hjá Rógva Jacobsen so at skora sítt 11. mál á landsliðnum og harvið leggja sjógv ímillum seg og hinar toppskjýttarnir á landsliðnum?

– Tað er sjálvandi deiligt at skora á landsliðnum, og nú er langt síðani, eg var við seinast, men fyrst og fremst so hugsi eg bara um at sleppa at spæla aftur. So fyribils er málið hjá mær er at koma fyri meg eftir skaðan, og vónandi klári eg at spæla teir seinastu dystirnar í ár fyri ÍF, sigur Rógvi Jacobsen

### Rógvi við gott mót

Rógvi Jacobsen er í dag 31-ára gamal, men hann hevur enn trúnna uppá, at hann kann gerast frískur, og tað er ikki hugurin at spæla bólt, sum er um at forkoma honum í at skora tað 11. málið fyri landsliðið.

– Eg trúgvi framvegis uppá, at eg kann blíva frískur og havi sum sagt ringt við at góðtaka, at eg ikki kann spæla fótbólt, tí tað er tað eg tími best. So tað er ikki aldurin, ið ger at eg møguliga má gevast, men skaðar og tað vil eg gera alt fyri, at tað ikki verða teir, sum skulu steðga mær, sigur Rógvi Jacobsen.

Rógvi Jacobsen bíðar nú eftir svari frá læknunum, og tað er væntandi, at tað svarið kemur um góðar tríggjar vikur.



# Bárður Bendix Mikkelsen venjari hjá Marienlyst

Tróndur Arge

Fyrrverandi føroyski flogbóltslandsliðsleikarin, Bárður Bendix Mikkelsen, er nú vorðin hjálparvenjari hjá danska flogbóltsfelagnum Marienlyst.

Bárður, sum hevur spælt 77 landsdystir við føroyska flogbóltslandsliðnum, verður hjálparvenjari hjá Marienlyst við ábyrgd fyri U21 liðnum og aðrudeildarliðnum hjá felagnum.

Í tíðindaskrivi sigur felagið, at Báður í fleiri kappingarár hevur verið hevari hjá felagnum og vunnið fýra meistaraheiti. Í løtuni er Bárður hjálparvenjari hjá U17 landsliðnum.

Venjaraliðið hjá felagnum er nú Mikkel Hauge, sum er høvuðsvenjari, Kaj R. Jeppesen, sum er hjálparvenjari, Jacob Nielsen, sum er fysiskur venjari og so Bárður Bendix Mikkelsen, sum er talentvenjari.

– Tað verður ein stór avbjóðing hjá mær at standa liðnum so nær og at vera við til at menna ungu talentini í Marienlyst, sigur Bárður Mikkelsen.

– Eg kenni felagið væl frá míni tíð sum leikari, og eg vóni, at eg við mínum royndum frá fleiri enn 400 dystum kann geva nakað víðari til ungu fólkini í felagnum, sigur hann.

Jens Gantriis, stjóri í Marienlyst, sigur, at tey hava leingi leitað eftir einum venjara við bæði royndum sum spælari og venjari.

– Tað hava vit heilt víst fingið við Bárði Mikkesen. Vigt hava í ár nógv ung talent í elituliðnumhjá okkum, og eisini U21 hevur potentiellar elituleikarar, so tað er av stórum týdningi, at vit leggja dent á hetta í okkara venjingum, sigur Jens Gantriis.

*trondur@sosialurin.fo*